

# Oljuprísurin lækkar meir í dag

Jógvan Hugo Gardar

14.12.2015 - 11:46

Oljan.fo

Oljuprísurin læækaði allar farnu viku, og fór fríggjadagin undir 40 dollarar fyri eitt fat av Norðsjóvaroljuni Brent. So lágur hevur rísurin ikki verið síðani desember 2008.

Í morgun byrjar vikan við at oljuprísurin heldur fram at lækka, og kostar í morgun umleið 37,36 dollarar fyri fatið av Brent. Lægsti prísurin í desember 2008 var 30. desember tá prísurin á Brentgjørdist 34,19 dollarar.

Amerikanska lættoljan WTI kostar í morgun 35,18 dollarar fyri fatið.